# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kærkomin gáva

Vit kunnu í hesum døgum sanna orðini, at tað kann vera stutt millum orð og gerð, hvat tó ikki altíð er so vanligt. Í fyrilestri sínum á Vinnudegnum í Norðurlandahúsinum fríggjadagin, róði Elin Heinesen, blaðstjóri framundir, at vinnulív og mentanarlív í størri mun eiga at stuðla upp undir hvørt annað. Hetta er gongdin í útheiminum, og hetta er ein gongd, sum eisini Føroyar kunnu gera sær dælt av. Ikki meira enn hálvtalað orð og vit hoyra góðu tíðindini av Müllersbrúgv, um at føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum hevur gjørt av at lata 400.000 kr. í stuðuli til tí fyrstu føroysku operuna.

Nú er tað einki nýtt í tí, at oljufeløg og fyri tað vinnufyritøkur sum heild lata stuðul til mentanarlig tiltøk. Tað nýggja í hesum er so, at føroyska oljufelagið fer undir framleiðslu í bretskum øki í næstu framtíð og í tí sambandinum letur inntøkurnar frá teimum fyrstu 1000 tunnunum av olju til hetta serstaka mentanarliga tiltakið. Hetta er so eisini í tráð við ynskið hjá einum av okkara mentanarfólkum, Gunnari Hoydal, rithøvunda, sum nøkur ár herfyri helt fyri, at ein komandi føroysk oljuvinna átti at seta sær sum mál at lata inntøkurnar, sum svara til ein pott av olju av hvørjari framleiddari tunnu av olju, til føroysku mentanina. Hvør veit, kanska hetta hetta átakið hjá føroyska oljufelagnum er ein staðfesting ella byrjan í so máta.

Felagið hevur annars fyri kortum verið úti eftir meiri partapeningi millum føroyingar og útlendingar til nettupp at kunna fara undir umrøddu framleiðslu. Ein kann so eisini siga, at avgerðin at lata pengar til eina føroyska operu er tøkk fyri tann áhuga, sum er vístur AP og tess komandi virksemi.

Í sambandi við at tíðindini um stuðulin komu alment fram takkaði ein av oddamonnunum aftanfyri tónleikatiltakið, Sunleif Rasmussen fyri stuðulin og helt fyri, at tað má sigast at vera ávíst samband millum oljufeløg og list, tí bæði alla tíðina royna at finna nýggjar leiðir. Hann helt tað eisini vera víðskygt av einum oljufelag at lata slíkan stuðul. –Tað vísir vit hava vinnulívsfólk, sum hava áræði segði hann á kunnandi fundinum um tiltakið.

Operain, sum talan er um, verður framførd í Norðurlandahúsinum 12. oktober.

**Sosialurin**

# Prixið reyk – og hvat so?

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



Tað ultimativa má altíð verða, at tónleikurin kemur í fyrstu røð, men nú tað kann staðfestast, at Prixið er rokið, skal enn størri fokus setast á, í hvønn mun vit vilja hava tónleikin fram

Fleiri ferðir hava vit ført fram, at tónleikurin kundi verið eitt alternativ til fiskivinnuna o.a, men fyri mong av okkum kann tað tykjast, eftir at avgerðin er tikin um, at Prix Føroyar ikki verður ein partur at føroyska tónleikapallinum, at vit ikki eru sørt fjálturstungin.

Vit skulu minnast til, at t.d. karrieran hjá Eivør o.ø. júst er sprottin úr Prixinum, og tí má tað vera ein løgin kensla, at nú skal hesin møguleikin ikki verða at finna longur.

Sjálvur eri eg ikki vísur í, at hetta er ein fremjandi og nýskapandi avgerð – men tað er nokk ikki tí støðan er sum hon er – men skal nakað beinast av vegnum, skal eitt ella annað koma ístaðin – alt annað gevur onga meining.

**Festivalarnir er IKKI avloysarin**

Eg eri sannførdur um, at festivalarnir ikki er nakar avloysari til Prixið, og tí eri eg eitt sindur bangin fyri, at tað veruliga ikki er tann stóri møguleikin at fáa eygað á talentini, og tískil detta mong hesum niður ímillum.

Alt hevur sín prís, plaga vit at siga, men her er prísurin sera stórur – bæði, tá hugsað verður um stóra arbeiði hjá Musikkskúlanum o.ø, og tað arbeiðið tann einstaki leggur úr hondum.

Tað er nú einaferð so, at, innan undirhaldsvinnuna, er tað alla tíðina ein spurningur um at gera seg sjónligan, og nú mugu vit so staðfesta, at ein av hesum møguleikunum hevur fingið eitt slag fyri bógvin.

**SETIÐ TÓNLEIKIN Á DAGSSKRÁNNA!**

Eitt er at geva skarvin yvir og eitt annað er so at vísa á alternativir, og so er spurningurin um vit hava nakað at seta ístaðin.

Onki er lýtaleyst og uttan feilir, men eg má siga sum er, at eg føli hetta at verða eitt afturstig, og eri stórliga bangin fyri, at enn einaferð hevur tónleikurin, og tey sum ROYNA at arbeiða fyri hesum, ligið STÓRTAP!

Havi fleiri ferðirnar hoyrt hetta, at tónleikurin ikki skal verða ein kapping, men eitt kann eg so staðfesta, at verður ikki hendа samantvinningin millum listarliga- og kappingarliga partin ikki gjørdur ein partur av tónleikinum, verða vit fyri stórtapi – í sera hørðu altjóða kappingini.

**Tónleikurin er eisini partur av LIBERALISTISKA rákinum**

Um vit vilja tað ella ei, so er tónleikurin eisini ein partur av globaliseringini og tí liberalistiska rákinum, vit síggja um allan heimin, og tí mugu vit reisa okkum úr hesum "jantaliga" fjasinum, og heldur síggja møguleikarnar enn forðingarnar.

Vóni, at vit fara síggja brúkiligar loysnir – tónleikinum at frama!

# Gallup

**HERI MOHR**



Tann 14. september 1946 var fólkaatkvøða í Føroyum. Tey, ið høvdu atkvøðurætt, skuldu svara »ja« ella »nei« til spurningin, um vit skuldu loysa úr ríkisfelagsskapinum við Danmark.

Sum kunnugt greiddu 5.656 atkvøður ja fyri loysing, meðan 5.490 greiddu nei.

Tá í tíðini var Fólkaflokkurin einsamallur flokkur á tingi, sum virkaði fyri »loysing«.

Til løgtingsvalið 6. november 1945 - fyrsta val eftir seinna heimsbardaga - greiddu 5.725 atkvøður fyri Fólkaflokkin, og til løgtingsvalið 8. november 1946 - tveir mánaðir eftir fólkaatkvøðuna - greiddu 5.396 atkvøður fyri Fólkaflokkin.

Niðurstøðan av hesum er, at av teimum, ið høvdu atkvøðurætt, atkvøddu:

| | | |
|---|---|---|
| 31% fyri loysing | 6. november 1945. | Luttøka 75.7% |
| 33% fyri loysing | 14. september 1946. | " 63% |
| 30% fyri loysing | 3. november 1946. | " 73.3% |

Hetta skal skiljast sum uppískoyti til eina galluppkanning fyri tveimum vikum síðani.

Tað er tó illa hugsandi, at Georg Gallup, sum við stórum kynstri fyri 70 árum síðani legði støðið til respektabla Gallupstovnin, vildi brýggjað seg um, at hansara navn varð sett í samband við øsing og beistagerð framd (fyri aðruferð) móti minnisvarðanum »Kongaminnið«, einasti obeliskur í okkara høvuðsstaði gjørdur úr gróti av dugnaligum havnarmonnum.

Vit føroyingar eiga, eins og øll onnur upplýst fólk, at rædast fysiskan og psykiskan terror, sum nú á døgum, eins og í miðøldini, verður framdur við abnormum, destruktivum symbolikki, kompromileysum politikki og religiøsari fundamentalismu.

Ágangur við slíkum dimensiónum ørkymlar, órógvar okkara mentala tryggleika. Og hetta er í sjálvum sær ein álvarsom hóttan, tí natúrlig javnvág ella linni millum sál og likam var sjálvt jørðildið, har okkara viðkvæma forna andaliga mentan mentist so at siga av sær sjálvum – og als ikki við innantómum rópi og geipi og løgnum lótum um frelsu.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.